# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Gleðin var ovurstór, tá Rógvi hevði sent bóltin í italska málið. Við sínum næsta máli móti sjálvastu heimsmeistarunum hevur Rógvi nú sett seg einsamallan á altjóða máltindin hjá Føroyum. Fýra av teimum tíggju málunum hjá Rógva eru skotin í júst lidnu undankappingini*

# 10-tal til Rógva

**Uttan at tað beinleiðis hevur verið eitt trýst, so ásannaði Rógvi Jacobsen, at tað var hugaligt, nú málmetið á landsliðnum er tikið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*
*jakup@sosialurin.fo*

**Modena, Italia:** Modena er kanska ikki tað staðið á heimskortinum, sum hevur størstu boðini at bera føroyingum. Mentanarliga verður Pavarotti helst altíð størsti varði teirra, eins og Ferrari-verksmiðjan er ein stórur stoltleiki í økinum.

Men fyri føroyingar fekk Alberto Braglia ein nýggjan týdning, tá Rógvi Jacobsen stútaði innlegg frá Johan Troest Davidsen upp um Marco Amelia og í netið. Málið var tað tíggjunda, sum Rógvi hevur skotið í altjóða dysti fyri Føroyar, og tað er met.

- Hatta er eitt gott innlegg frá Johan, sum eg sjálvandi fari upp eftir. Eg haldi eg missi eitt fet, og ivist í, um eg yvir høvur náddi bóltinum. Eg væntaði faktiskt ikki, at eg rakk honum, men tað var fantastiskt at síggja handan bóltin fara inn, segði Rógvi.

*Og tú vart skjótur at marķera, at hetta var nummar 10?*

- Ja. Nú er hetta metið hjá Toda nevnt fleiri ferðir. Eg havi sjálvandi ikki vilja tosað ov nógv um tað, men tað er deiligt, at hetta ikki longur er ein spurningur. Nú er metið tikið, og so má eg royna at fáa nøkur mál afturat. Eg vil ikki siga, at eg havi kent nakað trýst í so máta. Men eg hevði sett mær fyri, at metið skuldi takast, so tað er á ein hátt ein lætti, at eg havi rokkið tí málinum.

*Og so fert tú kanska at loyva øðrum framat í málskjótingini eisini?*

- Tað skulu teir sjálvandi vera væl komnir til. Tað skal so ikki verða nakar trupulleiki!

## Leggja aftur til brots

Sunnudagin verður lutakast um, hvussu spælast skal í komandi HM-undankappingini. Tað ber millum annað við sær, at fýra av føroysku FSF-umboðunum her í Modena í morgun løgdu leiðina til Johannesburg í Suðurafrika, har lutakastið verður.

Og so er spurningurin, hvørji lið teir fýra, Jógvan Martin Olsen, Ísak Mikladal, Óli Holm og Magnus av Stongum koma heimaftur við. Seinastu tríggjar undankappingarnar ber illa til at staðfesta annað, enn at Føroyar hava verið stak hepnar í so máta. Týskland, tvær ferðir Frakland og eina ferð Italia eru undir øllum umstøðum lið, sum støðugt amast móti absoluta heimstoppinum. Og tó at Ongland ikki kann sigast at gera tað sama, nú teir ikki vunnu seg til EM-endaspælið, so er lítil ivi um, at júst Ongland man vera tað liðið, sum meira enn nakar kann fylla karmarnar kring ein landsdyst í Føroyum.

Lutakastið í Johannesburg verður altso sunnudagin, og fram til tá mugu føroysku áskoðararnir og spælararnir brynja seg við toli.

**-mørk**